# Flaggskipið í spírandi olj



*Johan Dahl, landsstýrismaður umborð á Eldborg*

**- Hetta skip kann av sonnum kallast flaggskipið, eitt - state of the art skip - innan eina føroyska spírandi oljutænastuvinnu, sum vónandi fer at verða enn ein týðandi inntøkukelda fyri samfelag okkara um fá ár segði Johan Dahl, landsstýrismaður m.a. í røðu síni í Norðurlandahúsinum leygardagin í sambandi við at Eldborg varð doypt. Hann segði víðari:**

FRÁLANDAVINNA
*Myndir Jan Müller*

"Tit hava við Eldborg lagt tykkum eftir at byggja eitt veitingarskip, sum skarar framúr í sínum segmenti og er mær kunnað, at nýggjasta tøknin innan oljurudding og sera framkomin sløkkiútgerð eru týðandi partar av skipinum, - umframt at verða veitingarskip við 800 m2 dekksøki.

Umhvørvisliga er eisini nýggjasta tøknin til minking av Co2 útláti og lýkur skipið sonevndu NOX krøvini, sum ger, at næstan onki útlát, so at siga, er frá skipinum umframt at skipið er dupultskrokkað sum eyka trygd.

Tað, at slík skip sum Eldborg verða skrásett í FAS er gott fyri okkum og passar væl til at Føroyar vilja uppbyggja eina kvalitets Føroyska Altjóða Skipaskrá.



*Borgir boða frá góðum. Her nýggja Eldborg, flaggskipið í frálandaflotanum og so ein minni borg, Vestborg, ið tænir eini aðrari gevandi vinnu, alingini.*

Tí er tað serliga gleðiligt at eygleiða, hvussu tað legst afturat føroyska flotanum og kann tað vera við til at menna okkum skjótt á hesum øki, sum er ein global vinna.

Tað, at tit hava áræði at fara undir hesa stóru verkætlan og vísa nýggjar leiðir, er ein góð fyrimynd hjá øðrum, sum kunnu vera noydd at leggja um frá fiskivinnu til aðra vinnu og at fyrireika okkum til oljuvirksemi á Føroyaøkinum, sum vónandi ein dag verður veruleiki.

Osmundur segði tað so beinrakið í dag í røðu síni, - vit vita ikki, hvussu tætt skattur okkara er, hetta tá hann hoyrdi skipið men onki sá í morguntokuni, og so knappliga sóust mastratopparnir úr mjørkanum, - soleiðis verður vónandi eisini við oljuni á landgrunni okkara.

### Sjóvinna og FAS

Sum landsstýrismaður í vinnumálum havi eg fingið ábyrgdina av sjóvinnu og hevur landsstýrið sett sær fyri, at sjóvinna skal gerast týðandi føroysk vinnugrein og er tað at frøast yvir, at arbeiðið við at tillaga FAS vísir seg at bera frukt og FAS skipaskráseting nú er vorðin so kappingarfør, at fleiri skip hava